# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 31-05-2023

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2023**
(Dagførd kvotutøl, restkvota frá 2022 sum felagskvota í 2023, kvotuflytingar millum ár o.a.)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 166 frá 20. desember 2022 um at skipa fiskiskapin eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2023 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2 verður "70.000 tons" broytt til: "153.285 tons".

**2.** Í § 3, stk. 1 verður "49.100 tons" broytt til: "132.385 tons".

**3.** Í § 3, stk. 2 verður "42.300 tons" broytt til: "117.556 tons".

**4.** Í § 4 verður "19.176 tons" broytt til: "53.291 tons".

**5.** Í § 5 verður "4.060 tons" broytt til: "11.283 tons".

**6.** Í §§ 6 og 7, 1. pkt. verður "1.019 tons" broytt til: "2.832 tons".

**7.** Í § 8 verður "7.049 tons" broytt til: "19.591 tons".

**8.** Í § 9, 1. pkt. verður "2.073 tons" broytt til: "5.762 tons".

**9.** Í § 10, 1. pkt. verður "726 tons" broytt til: "2.017 tons".

**10.** Í § 11, 1. pkt. verður "690 tons" broytt til: "1.917 tons".

**11.** Í § 12, stk. 1 verður "144 tons" broytt til: "399 tons".

**12.** Í § 12, stk. 2 verður "144 tonsini" broytt til: "399 tonsini".

**13.** Í § 14, stk. 1 verður "850 tons" broytt til: "1.800 tons".

**14.** Í § 15, stk. 1 verður "2.665 tons" broytt til: "7.406 tons".

**15.** Í § 15, stk. 1 verður "8 ára" strikað.

**16.** Í § 15 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Eigari av fiskifari við kvotu av nøgdini í stk. 1, har gildistíðarskeiðið er runnið, og kvotan er útlutað sum egin árskvota, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini fiska upp um egnu árskvotuna í 2023, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2023. Ov nógv fiskað í 2023 verður sambært § 34, stk. 4, 2. pkt. í løgtingslógini mótroknað av egnari árskvotu í 2024."

**17.** Í § 16, stk. 1 verður “5.950 tons” broytt til: “13.029 tons”.

**18.** Í § 17, stk. 1 verður “3.680 tons” broytt til: “10.227 tons”.

**19.** Í § 17 verður sum stk. 2-4 sett:
“*Stk. 2.* Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu av nøgdini í stk. 1, og sum í 2022 legði kvotu um til egna árskvotu sambært § 49, stk. 4, í løgtingslógini, og sum í 2022 er útlutað sum egin árskvota, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini flyta kvotu, sum ikki er fiskað í 2022 til 2023, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2022.
*Stk. 3.* Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu av nøgdini í stk. 1, og sum er løgd um til egna árskvotu sambært § 49, stk. 4 í løgtingslógini, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini flyta kvotu, sum ikki er fiskað í 2023 til 2024, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2023.
*Stk. 4.* Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu av nøgdini í stk. 1, og sum er løgd um til egna árskvotu sambært § 49, stk. 4 í løgtingslógini, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini fiska upp um egnu árskvotuna í 2023, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2023. Ov nógv fiskað í 2023 verður sambært § 34, stk. 4, 2. pkt. í løgtingslógini mótroknað av egnari árskvotu í 2024.

**20.** Aftan á § 18, men áðrenn yvirskriftina yvir § 19, verður sett:

”**§ 18 a.** Av ófiskaðari føroyskari makrelkvotu í 2022 verða 54.000 tons flutt til at verða fiskað í 2023. Fiskiskapurin kann fara fram í føroyskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.
*Stk. 2.* Nøgdin í stk. 1 verður latin sum felagskvota við hámarki til eigarar av fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum í 2023 hava rætt at fiska makrel. Hámarkið hjá hvørjum fiskifari er 4.500 tons.
*Stk. 3.* Fyri at fáa fiskiloyvi sambært stk. 2, skal egin árskvota, tillutað í 2023 sambært §§ 4-11, egin árskvota av nøgdunum í §§ 15-17 ella kvota tillutað av nøgdini í § 15, vera fiskað. Somuleiðis skal flutt restkvota frá 2022 til 2023 og avhend kvota í 2023 vera fiskað.
*Stk.4.* Eru líkindi fyri, at kvotan í stk. 1 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin broyta ella taka burtur hámarkið.”

**21.** Í § 20, stk. 2 verður “16. juni 2023, kl. 16.00” broytt til: “dd.mm. 2023, kl. 12.00”.

**22.** Aftan á § 28, men áðrenn yvirskriftina yvir § 29, verður sett:

“*Snurpinót og uppsjóvartrol í føroyskum sjógvi*

**§ 28 a.** Í føroyskum sjógvi er veiða eftir makreli við snurpinót ella uppsjóvartroli av kvotu sambært hesi kunngerð bert loyvd uttan fyri linjur drignar 12 fjórðingar úr grundlinjunum, ið eru ásettar í bekendtgørelse om afgrænsningen af søterritoriet ved Færøerne.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, xx. juni 2023

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen